# List á Reyða Torgi

**Listaskálin Gallarí Oyggin er virkin partur av jóansøku-skránni. Føroysk og útlendsdk nøvn sýna fram og politikarar fara at mála málningar, sum Tobbi síðani selur á uppboðssølu**

LIST
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Oyggin á Tvøroyri er vorðin kendur listaskáli og á jóansøku verður fernisering fríggjakvøldið klokkan 19:00. Rannvá Mortensen, ættað av Tvøroyri, Palle Julsgart, listamaður og galleríeigari, og Preben Boye úr Danmark sýna fram. Jóannes Nielsen fer at lesa yrkingar og Kristel Lisberg fer at syngja.

Rannvá Mortensen, ið er av Tvøroyri, og danin Preben Boye, hava áður vitjað Oynna og tey vitja nú aftur við spennandi list.

## Politisk list

Leygardagurin á jóansøku verður spennandi í Oynni.

Á jóansøku fara politikarar í Suðuroynni at sýna fram listaverk, sum teir hava málað og klokkan 21 leygarkvøldið fer Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, at selja málningarnar á uppboðssølu. Talan verður um málningar eftir lokalar politikarar og landspolitikarar, ið hava tilknýti til Suðuroynna. Hetta fer fram á sonevnda Reyða Plássinum í Gallarí Oynni.

Kirkjukórið Ljómur fer eisini at seta dám á løtuna.

Oyggin er víðfevndur listaskáli, har eisini umhvørvið uttanfyri, aldingarðurin, er partur av heildarupplivingini.

Gallarí Oyggin liggur væl fyri við høvuðsvegin og aldingarðurin, ið er listprýddur, ger ein náttúrligan yvirgang frá alfaraveg og inn í listarliga umhvørvið, ið er opið fyri jóansøkugestum.



*Gallarí Oyggin liggur væl fyri við høvuðsvegin og aldingarðurin, ið er listprýddur, ger ein náttúrligan yvirgang frá alfaraveg og inn í listarliga umhvørvið, ið er opið fyri jóansøkugestum.*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

Teir, sum hava játtað at mála til framsýningina hjá gallarí Oyggin, eru sambært Palle Julsgart, Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, og løgtingslimirnir Jenis av Rana, John Johannessen, Kristian Magnussen, Hans Pauli Strøm, Sverri Midjord, Johan Dahl, Hergeir Nielsen og Henrik Old.

Og so eru tað borgarstjórarnir Heðin Mortensen, Kirsten Strøm, Kristin Michelsen, Elin Nielsen, Delmar Tausen og borgarstjórarnir í Porker, Sumba og Hvalba.

